# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# CITROËN VIÐ PANORAMAÚTSÝNI

**BILTEST** Meira pláss, betri kvalitetur og flottari design er nakað av tí sum eyðkennir nýggja Citroën C3, sum fæst við forrúti við panoramaútsýni

Eftir at yvir tvær milliónir Citroën C3 eru framleiddir, síðan bilurin varð presenteraður í 2002, er C3 nú avloystur av einum heilt nýggjum bili við sama navni.

Nýggi C3 er nakað størri enn forgangarin og innrættaður soleiðis, at munandi betri pláss er í kabinuni. Designið innan er í tráð við nýggja Citroën-stílin við alulook panelum og gjøgnumførdum kvaliteti. Viðførisrúmið er 300 litrar, sum er eitt tað størsta í klassanum.

Sum eykaútgerð fæst C3 við stórum panorama-forrúti, sum røkkur langt upp á takið. Hetta gevur eina heilt serliga kenslu og eitt fantastiskt útsýni, eisini her í Føroyum við høgum fjøllum fram við vegunum. Um sólin sjenerar ber til at draga loftbetrekkið við innbygdun sólskermum fram undir rútin, tá verður tað sum í einum bili við vanligum forrúti.

C3 fæst við tveimum bensinmotorum við ávikavist 75 og 95 hk, og tveimum HDi-dieselmotorum við 70 og 90 hk. Allir motorarnir lúka tey strangastu krøvini til $CO_2$ útlát og eru sera økonomiskir. Til dømis koyrir HDi-dieselútgávan út ímóti 30 km/l, og útlátið er einans 99 g/km.

Citroën C3 er lættur at koyra og at umgangast í allar mátar. Koyrieginleikarnir eru komfortablir, og nógv er gjørt við ljóðdoyving, soleiðis at lítið hoyrist til motorin og hjólini undir koyring.

Hvat útgerð viðvíkur fæst C3 í útgávunum Attraction, Dynamique og Exclusive. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Ivan Bilum við Hoyvíksvegin. Prísurin byrjar við kr.169.000,-

